## Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 30.nov.2019<br>Tíð:kl 16.00 – 18.00 | Luttakarar: Allan, Jóhan, Súsanna, Vivian, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt: Bergun |
|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn | avgreitt | AM |
| 2. | Mannagongd tá talan er um hóttanir og harðskap mótvegis lærarum | Lærarafelagið hevur vent sær til skúlarnar við eini vegleiðandi mannagongd í samband við hóttanir og harðskap mótvegis lærarum. Hetta er gjørt, fyri at skráseta teir tilburðir, ið eru í skúlunum Námsfrøðingar skulu á sama hátt skráseta sínar tilburðir.<br>Henda mannagongd er beind í trygdarnevndina, orska hetta kann bólkast sum ein arbeiðsumhvørvis spurningur. Skúlin hevur eina ætlan um at fáa eina meira einfalda mannagongd.<br>Talan er um eina broyting í fólkaskúlanum, at tað í dag koma slíkir tilburðir fyri og teir eru í yngstu árgangunum. | MH |
| 3. | Kjak í kjalarvørrinum á undirvíngartilboðnum í fuglafirði. | Málið í Fuglafirði bleiv tikið upp.<br>Á fyrra fundi hava vit umrøtt mannagongdina í samband við val av undirvísingartilfari. Undirvísingartilfar verður valt av lærarnum í tráð við námsætlanina.<br>Á pappírinum skal skúlastýri hava eftirlit við tí, men hetta letur seg illa gera í gerandisdegnum tí tilfarið er rúgvismikið.<br>Skúlastýrið er ein eftirlitsmynduleiki tí ber til at venda sær henda vegin um ein er misnøgdur við avgerð hjá lærarum og ella skúlaleiðslu. | AM |
| 4 | Kunning | Parkeringsøkið.<br>Kommunan er komin við eini loysn til niðara enda á parkeringsøkinum,, at forða fyri at bilar kunnu fara oman av.<br>”Sukurmolin”<br>Hann er enn til ampa, tí økið í grunddeild er merkt av at tað er trongt og nógv óljóð. Eisni er ringt at finna semju um nýtsluna av rúminum.<br>Nýtslan av skóm inni í skúlanum er ikki heilt í lagi, tá ið næmingar skulu úr skóm og nakrir lærarar kunnu ganga í | MH/ VJ |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | skóm sum teimum lystur. Annað er at tað er ein av-bjóðing at hava ein tráð í reglunum sum eru galdandi, tá so nógv virksemi er. | |
| 5 | | | Avtalu um felags foreldrafund.<br><br>Jólaborðhald er tann 29.jan kl 18.00 | |
| | | | | |